# Annika tryggjar javnstøðu í valnevnd

**JAVNSTØÐA** Eftir nógvar og harðar atfinningar, verður nú javnstøða í nevndini, sum Løgtingið hevur samtykt at seta at endurskoða valskipan okkara.

Áki Bertholdsen

Hergeir Nielsen, løgtingsformaður, ætlar sær at heita á Anniku Olsen, landsstýrøiskvinnu í innlendismálum, um at velja eitt konufólk í nevndina, sum skal endurskoða valskipanina, ístaðin fyri Sjúrð Rasmussen, sum hevur boðað frá, at hann tekur ikki við valið í nevndini.

Annika Olsen er í summarfrí, men hon sigur, at hon hevur onga áheitan fingið um at velja konufólk í nevndini.

Men hon ger samstundis greitt, at hon fer at taka áheitanina til eftirtektar og at velja eitt konufólk í nevndina.

Sostatt verða trý av øðrum kyninum og tvey av hinum kyninum í nevndini og nærri javnstøðu slepst ikki í eini nevnd við fimm fólkum.

Annars hava allir teir politisku flokkarnir valt hvør sítt mannfólk í nevndina, men Hergeir Nielsen, løgtingsformaður, sigur, at vilja teir flokkar, sum hava kvinnulig umboð á tingið endurskoða nevndarvalið og velja konufólk ístaðin fer hann at taka tað til eftirtektar.




*Landsstýriskvinnan í innlendismálum ætlar sær at velja eina kvinnu í nevndina, sum skal endurskoða valskipanina*

# Fegnast um javnstøðu í valnevnd

Áki Bertholdsen

– Hetta kann eg ikki annað enn fegnast, sigur Kristianna Winther Poulsen, forkvinna í javnstøðunevndini.

Hon sigur, at við tveimum konufólkum og trimum mannfólkum í serfrøðinganevndini, ber ikki til at koma nærri eini javnstøðu ímillum kynini, tá ið talan er um eina nevnd við fimm fólkum.

Tá ið Løgtingið setir eina nevnd, skal býtið ímillum kynini vera so javnt, sum tilber, annars er tað brot á javnstøðulógina, sigur hon.

Tá ið tað varð greitt, at tað bara var eitt konufólk í serfrøðingabólkinum, sum taldi fimm limir, talaði javnstøðunevndin sostatt at.

Løgtingið valdi eitt mannfólk og eitt konufólk í nevndina. Fróðskaparsetrið skuldi bara velja ein nevndarlim. Men Innlendismálaráðið skuldi velja tveir limir og teir blivu báðir mannfólk.

– Vit skrivaðu tískil løgtingsformaninum bræv og bóðu hann heita á innlendismálaráðið um at halda javnstøðulógina.

Og nú er eitt gylt høvi til tað við tað, at annað umboðið hjá innlendismálaráðnum hevur boðað frá, at hann tekur ikki vil vali í nevndina og vit kunnu ikki annað enn fegnast um, at krøvini í javnstøðulógini verða hildin, sigur Kristianna Winther Poulsen.

Teir politisku flokkarnir hava valt hvør sítt mannfólk í ein politiskan fylgibólk. Javnaðarflokkurin og Tjóðveldi hava nú eisini møguleikan at endurskoða støðuna og at velja eitt konufólk í nevndina ístaðin, men enn er ikki greitt, um teir fara at taka av.


STARVSFÓLK

## **Bakkafrost** søkir maskinmeistara

### Søkt verður eftir maskinmeistara til Bakkafrost Harvest Klaksvík

Bakkafrost Harvest, Klaksvík, er eitt sera framkomið kryvjivirki, ið tekur ímóti umleið 18.000 til 20.000 tonsum av aldum laksi um árið.
Á virkinum arbeiða 30 til 35 fólk

**Førleikar:**
Tann, ið settur verður, skal hava viðkomandi royndir og útbúgving.

**Arbeiðið:**
Arbeiðsøkið er alt vanligt maskin- og umvælingararbeiði, herundir viðlíkahald, rakstur og stýring av eykalutagoymslu. Viðkomandi skal kunna arbeiða sjálvstøðugt undir virkiðsleiðarnum.

Løn og setanartreytir eru í samráð við leiðsluna.

Umsóknarfreistin er 31/07-2010

Fyrispurningar: Kári E. Jacobsen, tel 235011

Áhugað biðjast senda skrivliga umsókn saman við prógvi til:
*P/f Bakkafrost Processing*
*Bakkavegur 9*
*Postboks 221*
*FO-625 Glyvrar*

ella við telduposti til
*kaja@bakkafrost.com*

Bakkafrost er største alifyritøka í Føroyum. Bakkafrost hevur ræði á allari virðisketuni frá smolti til liðugvøruframleiðslu. Bakkafrost framleiðir m.a. feskan laks til sushimarknaðin og lidnar porsjónsvørur til stórar handilsketur. Bakkafrost leggur dent á lívfrøðiliga trygd, dugnalig starvsfólk, lágkostnaðarframleiðslu, virðisøking og vakstrarmøguleikar. Bakkafrost er skrásett á Oslo Børs. Umleið 450 starvsfólk starvast á Bakkafrost.

Bakkavegur 9 · PO Box 221 · FO-625 Glyvrar · Tel +298 40 50 00 · Fax +298 40 50 09 · www.bakkafrost.com

BAKKAFROST
ESTABLISHED 1968

Sosialurin / KvR 34 18 00